

*Nógv áhugaverd tiltøk verða í bygdarhúsinum á Strondum í dag og í morgin*

# Fleiri áhugaverd tiltøk á Strondum

TILTØK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Rættiligt lív er komið í aftur í bygdarhúsinum á Strondum, síðan Sonni Johansen varð settur sum samskipari í húsinum, 1. oktober í ár.

Skipað hevur verið fyri ymiskum tiltøkum hvørt vikuskifti; tey flestu tó við ymiskum sangi. Seinasta vikuskiftið var hugnakvøld, har Sámal Ravnsfjall og Ronni Nielsen luttóku. Jóan Karl Djurhuus av Selatrað segði eisini frá ymiskum søgum og hendingum í lívinum. Á Strondum siga tey, at Jóan Karl dugdi væl at siga frá og var ógvuliga skemtiligur í sínum frásagnum.

Eini 70 fólk vóru til tiltakið á Strondum seinasta vikuskiftið.

**Stórt tiltak**

Aftur hetta vikuskiftið, í dag og í morgin, er nógv á skránni í bygdarhúsinum.

Høvið verður at síggja gamlar myndir av Strondum og strandingum; har verður málningaframsýning við Ketty á Fríðriksmørk, 17 ára gamla Fróða Abrahamsen, og eisini hevur samskiparin, Sonni Johansen, málningar við á framsýningini.

Sonni sigur, at Ketty hevur málað í fleiri ár, meðan hann sjálvur og Fróði eru lutfalsliga nýggir undir sólini sum listamenn.

Undirhald við sangi, dansi og gykli verður eisini í bygdarhúsinum, og harafturat verður framsýning av motorsúklum, skutarum, knallertum og sonevndari MC-útgerð, ið eitt nú fevnir um hjálmar og klæði til koyring á motorsúklu og knallertum.

**Skráin**

Tiltakið í bygdarhúsinum um vikuskiftið verður annars skipað soleiðis:

Í dag, leygardagin, lata framsýningarnar upp klokkan 14, klokkan 19 syngur Lív Hansen, og bygdarhúsið letur aftur klokkan 22.

Í morgin, sunnudagin, lata framsýningarnar upp klokkan 15, klokkan 17.30 syngja og dansa ungar gentur á Strondum, og klokkan 18.00 fer gyklarin, Rógvi Dam, at sýna fram kynstur, og tá verður eisini okkurt leskiligt til børnini.

Klokkan 18.30 sunnudagin fara ungar gentur á Strondum aftur at undirhalda við sangi og dansi.

Sunnukvøldið letur bygdarhúsið aftur klokkan 21.

Kostnaðurin er 50 krónur fyri vaksin og 20 krónur fyri børn.

Føroya Bjór og Damfar hava stuðlað tiltakinum, sum hetta vikuskiftið verður í bygdarhúsinum á Strondum.

# Virtuel útgáva frá Messel

Mikudagin kom nýggja útgávan hjá Terja Messel, Songs by Messel, á alnetið. Talan er um níggju løg, sum øll eru tøk í MP3-formati, sum kunnu heintast beinleiðis niður á telduna. Løgini kunnu síðani avspælast í einum MP3 spælara, ella á I-pod.

**-jm**

# Smakkaðu føroyskt jólaøl

ØLSMAKKING
*tíðindaskriv frá felagnum, ølvinir*

Felagið skipaði fyri ølsmakking hósdagin tann 04.11.2004 fyri limum sýnum. Smakkað var upp á »Jólabryggj« frá Føroya Bjór og »Jólatrøll« frá Restorff´s.

Kartakterurin, sum givin verður, verður máldur í krússum, og verða hesi givin fyri lit, smakk, krydd, kolsyruinnihal, skúm, eftirsmakk, anga ogheildarmynd

**Jólatrøll (Restorff´s) Fimm krúss**

Ølið er ravgult á liti, skúm sum stendur eina løtu og ølið hevur ein rímuligan anga. Ølið kundi gott havt eitt sindur meira av kolsýru (brús). Malt smakkurin er góður, men nakað stuttvarandi, (kundi havt ein longri eftirsmakk). Ølið er vælegnað sum veitsludrykkur og aftur við løttum mati (td. kalt borð).

Alt í alt ein eitt sindur ov løtt/ljós øl til at vera ein »Jólaøl«. Men tó, hon smakkar væl av eini øl at vera, sum er 5,8 % vol.

**Jólabryggj (Føroya Bjór) Seks krúss**

Ølið er karamell-litt á liti, skúm sum stendur væl og er mjúkt at drekka. Ølið sýnist gott fyri eiga og hevur ein rímuligan anga. Maltsmakkurin er góður. Ølið er nakað kryddað og hevur ein langan og kraftigan eftirsmakk. Ølið er vælegnað sum veitsludrykkur og hóskar væl til sterkan mat (t.d. ræst kjøt)

Alt í alt ein dimm øl sum minnir um at verða ein »Jólaøl«. Men tó hon smakkar væl av eini øl at vera, sum er 5,8% vol.

**Niðurstøða**

Samanumtikið duga føroysku bryggjaríini væl at bryggja øl. Hvat øl er betur er jú upp til góman at avgera. Summi eru til myrkt og kryddað øl, meðan onnur eru til ljóst og lætt øl.

Ølsmakkararnir hesaferð sakna tó eina veruliga »Jólaøl« . Eina øl, , sum minnir um jólaølina, sum bryggjaríini kunnu selja í handlunum.

Altso er uppskriftin eftir meiningini hjá ølvinum: Myrkt, søtt/kryddað, gott skúm (skal standa leingi), langan eftirsmakk, 5,8% vol.

Eftir meting limunum í »ølvinir« burdi tað verði loyvt at bryggja sterkari øl enn 5,8 % - tí tað er ikki lætt at bryggja eina »góða øl« tá bryggjaríini skulu halda seg til eitt mark, sum er 5,8% vol.

# Uppilagstur útróðrarmaður skipar fyri

**– Hetta er eitt spennandi arbeiði, sum eg nú fari at leggja mína orku í, sigur Sonni Johansen, samskipari, sum annars hevur róð út í egnum báti, síðan hann var 13-14 ára gamal**

UMSKIFTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nýggi samskiparin í bygdarhúsinum á Strondum, Sonni Johansen, sum Sjóvar kommuna setti í starv, 1. oktober í ár, hevur róð út í egnum báti, síðan hann var 13-14 ára gamal. Í dag er hann 42. - Tað slítir nógv uppá likamið at vera útróðrarmaður, og eg noyddist at gevast, tí eg var uppslitin.

Sonni sigur, at árini sum útróðrarmaður hava gingið út yvir meginpartin av kroppinum, og seinastu tíðina hevur hann serliga havt trupulleikar við ørmunum og albogunum.

– Tað er væl kent millum menn, sum hava róð út í mong ár, at hetta hevur gingið út yvir bein, lendar, armar og rygg.

Hann sigur, at nú hann er vorðin uppilagstur við arbeiðsskaðum og hevur fingið starvið sum samskipari í bygdarhúsinum, ætlar hann at gera nógv fyri, at lív kemur í aftur húsið.

– Hetta er eitt spennandi arbeiði, sum eg nú fari at leggja mína orku í, sigur Sonni Johansen, samskipari og uppilagstur útróðrarmaður.



*Sonni Johansen hevur róð út í egnum báti, síðan hann var 13-14 ára gamal. Nú er hann samskipari í bygdarhúsinum á Strondum*